LM-045/2023

Fylgiskjal 12

Ummæli um broyting í kap. 24 í revsilógini

"Aldur og royndir" **1**
Revsing **1**
Um § 225 **1**
Málburður **2**

"Aldur og royndir"

Í § 229 stendur "[...] og við at misnýta sína yvirvág í aldri og royndum [...]." Hetta kann vera ov avmarkandi. Brotsmaðurin kann eitt nú vera ungur ella lítið mentur og kortini megna at knýta slíkt trúnaðarband, sum gevur honum føri at fremja kynsliga brotsgerð móti ungum ella barni. Aldur og royndir hava møguliga einki við lokkan at gera, kanska serliga á netinum. Tað stendur heldur ikki, hvørjar royndir sipað verður til. Hetta tykist at vera skrivað í kjalarvørrinum á nevnda málinum, men av tí sama ov neyvt svar upp á júst tað málið.

Vit skjóta upp hetta orðalag:
"§ 229. Fyri lokkan verður tann revsaður við sekt ella fongsli alt at 2 árum, sum miðvíst ella við snildum bindur (trúnaðar)band við persón undir 18 ár við ætlan um at fremja kynsliga brotsgerð móti viðkomandi."

Aldur hevur møguliga ongan týdning á netinum, tí tá sæst aldur ikki neyðturviliga, meðan í støðu sum í § 223, stk. 2 sæst aldur, tí persónarnir eru til staðar.

Um tørvur er á orðalagnum "yvirvág", kann tað kanska verða umhugsað meira ella greitt meira frá tí, tí tað tykist ov avmarkandi eftir orðalagi uppskotsins.

Revsing

Sekt og fongsul eru møguliga ikki mest viðkomandi revsingarnar fyri at lokka, men hetta krevur nærri kanning.

Um § 225

Ískoytið nevnir tað, at onkur fer kynsliga við sær sjálvum. Men tað kann eisini hugsast, at hin ungi ella barnið fer kynsliga við øðrum enn brotsmanninum. Ella at hin ungi ella barnið fer kynsliga við síni umboðan í tykisheimi. Tað eru fleiri føri at hugsa um. Spurningurin er, um løgtøkniliga er lættast at breiðka hugtakið "aðrar kynsligar gerðir enn samlegu" til at fevna

um kynslív við seg sjálvan og onnur, heldur enn at leingja greinina við at nevna ávísu førini, sum kanska verða fleiri.

Málburður

Í viðtøkum okkara stendur, at felagið skal "virka fyri at menna føroyskt brotsfrøðimál". Vit meta, at revsilógin ávirkar føroyskt brotsfrøðimál, og hava tí hesar málsligu viðmerkingar:

- Vit halda *lokkan* vera rættari enn *lokking*, um farið verður eftir gomlu regluni, at veikt bent sagnorð (t.e. at *lokka*, *lokk<u>ar</u>*, *lokk<u>aði</u>*) fær navnorð, ið endar við *-an*. T.d. fær orðið *byrja* (í tátíð *byrj<u>aði</u>*) navnorðið *byrj<u>an</u>*.
- "[A]t fremja kynsligar gerðir á seg sjálvan" kundi fyndugari verið orðað "at fara kynsliga við sær sjálvum."
- "[B]yggir upp eitt samband" kundi fyndugari verið orðað "bindur band" ella "bindur trúnaðarband".

Við kvøðu,
umboðandi felagið
Ingmar Berg Mikkelsen, formaður